FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 17. mai 2023
J.nr.: 23/10379
Viðgjørt: DH

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-090/2022 frá Bjarna Hammer, løgtingsmanni, settur landsstýrismanni í fíggjarmálum, Ruth Vang, um veiðigjøld.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu stórur partur av bruttovinninginum hava tilfeingisgjøldini verið í uppsjóvarvinnuni seinastu 10 árini - hvørt ár sær?

Svar

Tilfeingisgjøldini vóru ávikavist 9% av bruttoúrslitinum í 2012, 27% í 2019 og fallin til 23% í 2020 og 2021. Í 2022 vóru uppsjóvarkvoturnar høgar, og tilfeingisinntøkurnar frá uppsjóvarfiski góðar 350 mió. kr. Roknskapirnir fyri 2022 eru ikki tøkir enn, so tí ber ikki til at siga, hvussu stórur partur av bruttoúrslitinum tilfeingisgjøldini vóru í 2022.

	2012	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020	2021
Avgjald á fiskatilfeingi	65.118	138.552	125.508	109.627	153.445	161.205	159.903	147.622	209.687	228.752
Uppboðssøla	0	0	0	0	49531	127915	132338	198582	64432	63966
Tilfeingisgjøld tilsamans	**65.118**	**138.552**	**125.508**	**109.627**	**202.976**	**289.120**	**292.241**	**346.204**	**274.119**	**292.718**
Nettosøla	1.087.305	1.164.973	1.243.488	1.421.708	1.616.013	1.630.626	1.661.155	1.739.318	1.710.223	1.811.658
Aðrar inntøkur	1.264	61	619	229	2.341	1.540	-	6	42.269	17.090
Framleiðslukostnaður	362.076	365.469	353.974	372.557	250.738	412.864	444.592	478.799	480.826	543.360
Bruttoúrslit**	**723.965**	**799.443**	**888.894**	**1.048.923**	**1.362.934**	**1.216.222**	**1.216.563**	**1.260.512**	**1.187.127**	**1.251.208**
Tilfeingisgjøld / Bruttoúrslit	**9%**	**17%**	**14%**	**10%**	**15%**	**24%**	**24%**	**27%**	**23%**	**23%**

*tølini eru í 1000 kr. **Tilfeingisgjøld eru ikki drigin frá

Í svarinum verða ávikavist veiðigjøld og uppboðsølugjøld, sum bæði verða goldin sum lutfalsligur partur av veiðinøgdini (kr/kg), roknað sum tilfeingisgjøld. Í tíðarskeiðnum 2012-2016 fekk landskassin eisini inntøkur frá serstøkum tilfeingisskatti, sum var ein eyka partafelagsskattur av vinningi omanfyri 1 mió. kr. Serstaki tilfeingisskatturin er ikki tikin við, tí hann verður ikki roknaður sum eitt tilfeingisgjald, men sum ein skattur.

Uppsjóvarvinnan er nágreinað sum tað, ið Hagstovan hevur bólkað sum fiskiskap til ídnað.

Tá ið spurt verður um tilfeingisgjøld sum part av bruttovinninginum, er neyðugt at tilskila, at tá ið bruttovinningur verður uppgjørdur, verða veiðigjøld vanliga drigin frá nettosøluni, tí talan er um ein variablan framleiðslukostnað.

Talvan omanfyri vísir bruttovinningin uttan tilfeingisgjøld fyri árini 2012-2021.

Tinganes, 17. mai 2023

Ruth Vang
Landsstýrismaður í fíggjarmálum